Funded by
the European Union



MARINE
SABRES

Marine Systems Approaches for Biodiversity Resilience and Ecosystem Sustainability

2022 - 2026

www.marinesabres.eu

@MarineSABRES

# Varðveitsla av lívmargfeldi í bláa búskapinum

## Um verkætlanina

**Marine SABRES** er ein altjóða verkætlan, sum hevur til endamáls at økja um nýtsluna av Vistfrøðisgrundaðari umsiting av havinum. Í stuttum merkir hetta, at betri atlit verður tikið til alla vistskipanina og samspælið ímillum umhvørvið og samfelagið.

Eitt av økjunum, sum er í fokus, er uppsjóvarfiskiskapur í Norðuratlantshavinum (Føroyum, Íslandi og Grønlandi). Hesin fiskiskapur hevur áhuga orsakað av búskaparliga virðinum og nøgdunum, umframt, at tað eru ferðandi fiskastovnar, sum strandalondini mugu umsita í felag við teimum avbjóðingum, sum standast av hesum.



# Stutt um granskingarøkini



### Tuskansku oyggjaflokkarnir

*Capraia*

Á hesum øki er dentur lagdur á samspælið millum ferðavinnu og lívmargfeldi. Serligur dentur er lagdur á varðveitslu og endurbyggjan av bendlatang, sum er nógv ávirkaður av bátaferðslu.



### Arktiska økið

*Ísland, Grønland og Føroyar*

Her verður serligur dentur lagdur á ávirkanina av veðurlagsbroytingum á uppsjóvarfiskiskap, og hvussu fiskiskapurin kann skipast á burðardyggan hátt frameftir.



### Makaronesia

*Azorurnar, Madeira, Kanarisku oyggjarnar*

Her verður dentur lagdur á varðveitslu og endurbyggjan av lívfrøðiligum margfeldi og fyrimunir av vistferðavinnu.

# Áhugað/ur at samskapa møguleikar og loysa avbjóðingar í uppsjóvarfiskiskapi?

Gev títt íkast við at luttaka sum áhugapartur í verkætlanini

**Les meira her** ⟶

## Hvat fært tú burturúr?

- Ver við til at geva eina fatan av sambandinum millum umhvørvið, fiskiskap og samfelagið.
- Ver við til at framleiða viðkomandi búskaparlig, rakstrarlig og/ella lívfrøðilig senario.
- Møguleikar fyri almennum, men dulnevndum, samskifti um tínar hugsanir um avbjóðingar og loysnir.
- Møguleiki fyri at siga tína hugsan um umsiting av fiskiskapi.
- Betri data og vitan, sum vónandi kann upplýsa og mynda politikk á fleiri økjum, sum t.d. økisplanlegging, grøna skiftið í fiskivinnuni og umsiting av ferðandi fiskastovnum.
- Møguleikar fyri at netverka og samstarva við áhugapartar.

## Hvør kann verða við?

Starvsfólk í fiskivinnuni, granskarar, serfrøðingar, starvsfólk í umsitingini, og øll, ið hava áhuga fyri uppsjóvarfiskiskapi, vistskipanini, og tilknýtinum av hesum til samfelagið.

## Hvat skalt tú gera?

Taka lut í tveimum dulnevndum samrøðum, ið vara 1 tíma hvør.
Í 2025 er ein møgulig ískoytissamrøða ella luttøka á einari verkstovu.

## Skanna QR koduna

fyri at lesa meira um verkætlanina og virksemið í Norðuratlantshavi.

@MarineSABRES

## Samband

**Dr. Unn Laksá**
samskipari fyri virksemið í Føroyum

unn@sjokovin.fo
+298 558500
www.sjokovin.fo